# FO-ráðið

## Ársfrásøgn fyri 2013

# Innihaldsyvirlit

**Síða**

**Átekningar**
Leiðsluátekning 2
Váttan frá óheftum grannskoðara 3

**Upplýsingar um sjálvsognarstovnin**
Upplýsingar um sjálvsognarstovnin 5

**Ársroknskapur**
Nýttur roknskaparháttur 6
Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2013 9
Fíggjarstøða tann 31. desember 2013 10
Notur til ársfrásøgnina 12

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar - 31. desember 2013 hjá FO-ráðnum.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Nevndin metir, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu sjálvsognarstovnsins tann 31. desember 2013 umframt av úrsliti sjálvsognarstovnsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013.

Tórshavn, tann 5. november 2014

**Nevnd**

Niels Chr. Nolsøe
formaður

Mimi Steintórsdóttir
næstformaður

Gudny Langgaard

Páll Wiberg Joensen

# Váttan frá óheftum grannskoðara

*Til limirnar í FO-ráðnum*

## Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá FO-ráðnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Ein grannskoðan ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

# Váttan frá óheftum grannskoðara

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsskapsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2013 og av úrslitinum av virksemi felagsskapsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2013 samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, tann 5. november 2014
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

# Upplýsingar um sjálvsognarstovnin

| | |
|---|---|
| **Sjálvsognarstovnurin** | FO-ráðið<br>Hoyvíksvegur 61<br>Postboks 1255<br>110 Tórshavn<br>Heimasíða: www.nic.fo<br><br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember<br>Heimstaður: Tórshavn |
| **Nevnd** | Niels Chr. Nolsøe, formaður<br>Mimi Steintórsdóttir, næstformaður<br>Gudny Langgaard<br>Páll Wiberg Joensen |
| **Grannskoðan** | SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f<br>Staravegur 17<br>100 Tórshavn |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá FO-ráðnum fyri 2013 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

### Um innrokning og virðisáseting

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at sjálvsognarstovnurin í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at sjálvsognarstovnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

# Nýttur roknskaparháttur

## Rakstrarroknskapur

### Nettosøla

Stovningargjøld verða inntøkuførd í tí ári, eitt nýtt økisnavn verður stovnsett, meðan ársgjøldini verða tíðargreinað til tað tíðarskeiðið, gjaldið er galdandi fyri. Sølan verður innroknað uttan mvg og onnur avgjøld.

### Uttanhýsis kostnaður

Uttanhýsis kostnaður fevnir um kostnaðir til sølu, lýsingar, umsiting v.m.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

### Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentuinntøkur og -kostnaðir.

### Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um felagsskatt og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkir ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkir bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

# Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

### Skyldugur skattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Útsett skattaáogn, íroknað skattliga virðið av framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður uppgjørd til tað virði, sum áognin verður mett at kunna realiserast til, antin við javnaði av skatting av framtíðar vinningi ella við mótrokning av útsettum skattaskyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Í teimum førum at skattliga virðið kann gerast upp eftir ymsum skattareglum, verður útsettur skattur virðisásettur við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist gjalding av skylduni.

Broytingar í útsettum skatti, sum standast av broytingum í skattasatsi, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin. Nýtti skattasatsurin í hesum ári er 49%.

### Skuld

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virði.

### Tíðaravmarkingar (undangoldið frá kundunum)

Tíðaravmarkingar, ið eru tiknar við sum skuld, fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparári.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2013

| | Nota | 2013<br>kr. | 2012<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Nettosøla** | | **1.349.523** | **1.367** |
| Uttanhýsis kostnaður | | -554.090 | -584 |
| **Bruttoúrslit** | | **795.433** | **783** |
| Starvsfólkakostnaður | 2 | -210.520 | -212 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **584.913** | **571** |
| Fíggjarligir kostnaðir | | -11.265 | -11 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **573.648** | **560** |
| Skattur av ársúrslitinum | 3 | -286.580 | -280 |
| **Ársúrslit** | | **287.068** | **280** |
| | | | |
| Fluttur vinningur | | 287.068 | 280 |
| | | **287.068** | **280** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2013

## Ogn

| | Nota | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| Onnur áogn | | 95.589 | 0 |
| Útsett skattaáogn | | 305.264 | 288 |
| **Áogn** | | **400.853** | **288** |
| **Tøkur peningur** | | **1.909.836** | **1.527** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **2.310.689** | **1.815** |
| **Ogn til samans** | | **2.310.689** | **1.815** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2013

## Skyldur

| | Nota | 2013 kr. | 2012 tkr. |
|---|---|---|---|
| Stovnsfæ | | 50.000 | 50 |
| Fluttur vinningur | | 1.208.414 | 921 |
| **Eginogn** | 5 | **1.258.414** | **971** |
| Undangoldið frá kundum | | 622.986 | 588 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 89.333 | 82 |
| Felagsskattur | | 339.956 | 112 |
| Onnur skuld | | 0 | 62 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **1.052.275** | **844** |
| **Skuld til samans** | | **1.052.275** | **844** |
| **Skyldur til samans** | | **2.310.689** | **1.815** |
| Høvuðsvirksemi | 1 | | |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 6 | | |

# Notur til ársfrásøgnina

## 1 Høvuðsvirksemi

Høvuðsvirksemi hjá sjálvsognarstovninum er:

a) at reka, beinleiðis ella óbeinleiðis, umsiting av .fo landøkinum
b) at tryggja, at .fo landøkið verður umsitið til gagns fyri vinnu, mentan og einstaklingar
c) at hava eftirlit við .fo landøkinum
d) at áseta reglur og prísir, tá ið brúksrættindi til økisnøvn í .fo landøkinum verða latin.

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| | kr. | tkr. |
| **2 Starvsfólkakostnaður** | | |
| Lønir | 203.640 | 204 |
| Lønartengd gjøld | 6.880 | 8 |
| | **210.520** | **212** |

| | | |
|---|---|---|
| **3 Skattur av ársúrslitinum** | | |
| Skattur at gjalda | 303.653 | 147 |
| Útsettur skattur í árinum | -17.073 | 133 |
| | **286.580** | **280** |

| | |
|---|---|
| **4 Felagsskattur** | |
| Skyldugur felagsskattur við ársbyrjan | 112.251 |
| Goldið í árinum | -79.696 |
| Tilskrivaðar rentur í árinum | 3.748 |
| Skattur av ársins skattskyldugu inntøku | 303.653 |
| **Skyldugur felagsskattur við árslok** | **339.956** |

# Notur til ársfrásøgnina

## 5 Eginogn

| | Stovnsfæ | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 1. januar 2013 | 50.000 | 921.346 | 971.346 |
| Ársúrslit | 0 | 287.068 | 287.068 |
| **Eginogn 31. desember 2013** | **50.000** | **1.208.414** | **1.258.414** |

## 6 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á sjálvsognarstovninum.